# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara elskaða

**Turið Sólbjørg Olsen**
Søldafjørður

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til Henning Bøgesvang prest fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til Jens Marna, Kim og Vox fyri avbera vakran sang, og annars til øll, sum vóru við til at gera jarðarferðina so vakra.
Tøkk til allar stuðlarnar, sangarar og kirkjutænarar.
Tøkk fyri heilsanir, blómur, kransar og gávur til Barnadeildina og Reiðrið.
Tøkk fyri ta ótrúligu hjálp vit fingu til jarðarferðina og ervi.

**Mamma og Jonhard, bwabba og Oddny, Tóra og Rebekka**

# Til minnis um Vigtor Albinus

**f.19. novembur 1948 – d. 6. juli 2008**



Tað vóru ógvuliga tung boð at fáa, at lívsneisti tin – systkinabarnið – var sløknaður. Tú hevði verið sjúkur í nógv ár, men kláraði brekið við at taka tablettir og annars passa upp á teg sjálvan. Ì juni mánað bleiv tú lagdur undir skurð, fyri fyri hetta brek. Tíverri funnu læknarnir á Skejby hospitali út av, at operatiónin fór ikki at eydnast, og tú kom tí heim aftur við vón um at liva sum vanligt í fleiri ár, men so bleiv ikki, tann 6. juli sløknaði lívsneisti tín. Eingin veit á morni at siga, hvar hann á kvøldi gistir.

Vit vóru saman so gott sum hvønn dag í nógv ár, vóru vit ikki á útróðri so umvældu vit okkurt umborð á Heimdal. Hvørt vár vóru vit á norðhavinum í upp til hálvan annan mánað, vit búðu umborð á Heimdal, har vit matgjørdu til okkum sjálvar og høvdu nógvar hugnaligar løtur saman við hinum útróðrarmonnunum, fyrst í Ondarfirði og tey síðstu árini í Klaksvík. Eg minnist nógvar góðar kortløtur, antin í lugarinum hjá okkum, umborð hjá Karl Arna ella umborð hjá Arthur sála, hetta vóru løtur sum eg vil minnast aftur á so leingi eg livi.

Karl Arni segði fyri mær, at hann var óvgvuliga glaður yvir, at hann hevði verið og heilsa uppá teg, dagin fyri at tú læt eyguni aftur fyri seinastu ferð. Hetta untist tíverri ikki mær, góði vinur.

Aftaná at eg fór niður við familjuni at búgva, høvdu vit ofta telefonsamband við hvønn annan, og hvat tosaðu vit mest um - útróður sjálvandi, Grethe og tú vóru eisini her niðri og vitjaðu okkum. Eisini frøddist eg yvir at tú var so glaður fyri arbeiði títt á røktarheiminum.

Tað var ógvuliga tungt fyri meg, at vera við til at bera teg til tín seinasta hvíldarstað undir Akurgerði og serliga tungir vóru dagarnar aftaná, tá ið mínir tankar førdu meg aftur til tað tið, vit høvdu havt saman.

Góða Grethe, eg veit, at tað er ógvuliga hart hjá tær at liva uttan Vigtor, tit vóru næstan altíð saman um alt sum tit gjørdu, men sum tú sjálv segði, lívið skal livast víðari, og eg ynski tær alt gott í framtíðini.

Takk fyri alt góði Vigtor.

Eg drýpi høvur og lýsi frið yvir minnið um Vigtor Albinus .

**Heri**

## Tøkk



Vit vilja við hesum takka øllum, sum við gávum, telegrammum og á annan hátt gleddu okkum á gullbrúðleypsdegnum tann 20. juli.
Eisini vilja vit takka hornorkestri og mannskóri, sum settu sín serliga dám á dagin, og ein tøkk til tykkum øll, sum vóru saman við okkum á Hotel Norð, og gjørdu dagin ógloymandi.
Harrin signi tykkum øll.

**Kathrina og Jacob Petur**

# Prógv sum læknaskrivarar

Fríggjadagin 29. august 2008 var móttøka í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum í samband við at Brynhild Maria Lamhauge og Tóra Amalia Gudmundsen fingu handað prógv sum læknaskrivarar.

Undirvísingin er á Landssjúkrahúsinum og er skipað soleiðis, at tey lesandi fara til Danmarkar á skúla 5 ferðir undir lesnaðinum, har til seinast ein verkætlan verður vard í samband við próvtøkuna. Útbúgvingarleiðari er Sæunn Ólavsdóttir Hansen.



*Brynhild Maria Lamhauge og Tóra Amalia Gudmundsen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Dagurin 2. september. Elisa**, profeturin sum kongabøkurnar í Gamla testamenti vita at greiða frá. Í gomlum álmanakkum var navnið skrivað Eliseus, sum kemur av latínska bíbliutýðingini Vulgata.